## Minni spenningur

Eftir naggatóðn í meiri enn eitt ár er líkt til, at viðurskiftini millum Kina og Tibet eru farin at batna. Støðan hevur verið rættiliga spent, og í fjør segði andaligi leiðarin hjá tibetanunum, Dalai Lama, at hansara landsmenn hava upplivað helviti á jørðini. Men nú sigur ein talsmaður hjá Dalai Lama við BBC, at tekin er um, at tann kinesiska stjórnin hevur endurskoðað sína støðu mótvegis Tibet. Eitt nú eru umboð úr Tibet og eitt umboð fyri tann útlagna Dalai Lama júst nú í Beijing og tosa við myndugleikarnar har. Fólkið í Tibert krevur størri sjálvræði, men higartil hevur Kina víst tí kravinum aftur.



## Í neyð av regni

Í Peru máttu myndugleikarnir senda bjargingarlið at hjálpa ferðafólki, sum vóru komin í neyð orsakað av áhaldandi regni, sum elvdi til fleiri skriðulop. Á vegnum millum býin Cuzco og ferðamannastaðið Marchu Picchu vóru næstan 2.000 ferðafólk, sum máttu fáa hjálp til at sleppa burtur haðani, tí ein skriða hevði stongt vegin. Innanríkisráðharrin segði í morgun, at stjórnin hevði gjørt av at senda herin at hjálpa bjargingarliðunum. Sambært myndugleikunum kravdi eitt skriðulop tvey mannalív.

# Hýsa fer framvegis óvirkað av landinum

**Orsøkin til, at prísirnir á hýsu hava verið betri seinastu dagarnar, enn teir annars hava verið í seinastuni, er ikki, at boykottið hjá bretsku handilsketunum av virkaðari hýsu undan Føroyum er av**

BOYKOTT
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Hýsa undan Føroyum kemur framvegis ikki til virkingar á føroyskum fiskavirkjum, og boykottið hjá bretsku handilsketunum heldur fram*

Herfyri var nógv frammi um, at hýsa undan Føroyum ikki kann virkast til útflutnings og seljast í Bretlandi, tí bretsku handilsketurnar vilja ikki hava føroyska hýsu í sínum vøruútboði.

Orsøkin er, siga handilsketurnar, at hýsuveiða undir Føroyum ikki verður mett at vera burðardygg.

Føroyski hýsumarknaðurin er í Bretlandi, og tá handilsketurnar ikki vilja keypa, er øll hýsan undan Føroyum í longri tíð farin óvirkað av landinum til smákeyparar í Bretlandi.

Seinastu dagarnar hava prísirnir fyri hýsu á Fiskamarknaði Føroya tó verið væl betri, enn teir annars hava verið leingi.

Hetta hevur fingið fólk at spyrja seg sjálvi, um orsøkin er, at bretsku handilsketurnar havt slept sínum boykotti av virkaðari hýsu undan Føroyum.

- Men so er ikki, sigur stjórin á Fiskamarknaði Føroya, Jens Christian Olsen, við Rás2.

### Feskari fiskur

Stjórin vísir á, at tað eru somu keyparar, sum hava keypt føroyska hýsu seinastu dagarnar, sum hava ligið fram við á marknaðinum leingi.

Jens Christian Olsen sigur, at talan er ikki um, at føroysk virkir nú aftur hava keypt hýsu til virkingar í Føroyum.

Hann sigur, at orsøkin til, at hýsuprísirnir hava verið betri á marknaðinum seinastu dagarnar, er, at hetta hevur verið rættiliga feskur fiskur, sum útróðrarbátar og línubátar hava landað.

Stórin á Fiskamarknaði Føroya sigur, at onkur línubátur, sum hevur gjørt stuttan túr, hevur verið inni, og haraftrat er talan um daggamlan útróðrarfisk, sum seldur er á uppboði seinastu dagarnar.

- Føroysk hýsa fer framvegis óvirkað av landinum, staðfestir Jens Christian Olsen.

## Høgur miðalprísur á Fiskamarknaðinum

**Miðalprísurin á Fiskamarknaði Føroya man sjáldan hava verið hægri, enn hann var í morgun, tá serliga havtaska varð í útboði**

FISKAPRÍSUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í morgun seldi Fiskamarknaður Føroya tilsamans 20 tons á uppboði.

Tá hugt verður eftir miðalprísinum fyri øll fiskasløgini, var hann út við 30 krónur fyri kilo, og hetta er óvanligt.

Orsøkin til góða miðalprísin er, at meginparturin av fiskinum, sum seldur varð í morgun, er havtaska.

Av teimum 20 tonsunum, vóru 16 tons av havtasku, sum fór fyri miðalprísin 32, 38 krónur fyri kilo.

Sølan hjá Fiskamarknaði Føroya í morgun gav tilsamans 585.000 krónur - og miðalprísurin fyri øll fiskasløgini samanlagt var 29,04 krónur.



*Havtaska hevur góðan prís í løtuni.*
*Hetta vísti sølan á Fiskamarknaði Føroya í morgun*



## 186 tons fyri 2,4 miljónir krónur

**Miðalprísurin fyri øll fiskasløgini samanlagt á Fiskamarknaði Føroya í gjár var 13,04 krónur fyri kilo**

FISKAPRÍSIR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fiskamarknaður Føroya seldi í gjár tilsamans 186 tons á uppboði fyri góðar 2,4 miljónir krónur. Miðalprísurin fyri øll fiskasløgini samanlagt var 13,04 krónur fyri kilo.

Av hesum 186 tonsunum vóru 111 tons toskur, harav nógv tær størstu nøgdirnar vóru av toski 3 og toski 4.

Miðalprísurin fyri tosk 3 var 16,30 krónur, og miðalprísurin fyri tosk 4 var 10,61 krónur fyri kilo.

Næst størstu nøgdirnar vóru av hýsu. Her var serliga talan um hýsu 2, sum fekk miðalprísin 12,09 krónur fyri kilo.

Tilsamans 56 tons av hýsu vórðu seld á marknaðinum í gjár. Lægsti miðalprísurin var 6,26 krónur fyri kilo.

Miðalprísurin fyri longu var omanfyri 13 krónur fyri kilo. Prísirnir fyri brosmu lógu úr 3,57 upp í góðar 10 krónur fyri kilo.